## Kristin sendistova vitjar kring oyggjarnar

Hesar komandi dagarnar koma tvey umboð fyri Altjóða Kristnu Sendistovuna í Jerúsalem til Føroyar at vitja.

Talan er um samskiparan, Jørgen Leenders og formannin í donsku deildini av hesi kristnu sendistovuni, Stig Christensen.

Á ferðini vitja teir kirkjur og samkomur kring landið, og fara at greiða frá arbeiðinum hjá sendistovuni í Jerúsalem.

Fyrsti fundurin verður hóskvøldið í missiónshúsinum í Vestmanna og kvøldið eftir verður møti í samkomuni Oasuni í Hoyvík.

Leygardagin verða tvey møtir hildin í missiónshúsinum í Skopun, og sunnudagin verður serstøk hátíðargudstænasta í Tjørnuvíkar kirkju. Við hesa gudstænastuna fer Kingo-kórið at syngja og Stig Christensen at prædika.

Um kvøldið verður møti í Lívsins Orði í Runavík og mánadagin fara teir báðir donsku gestirnir avstað aftur.

Endamálið hjá Altjóða Kristnu Sendistovuna í Jerúsalem er m.a. at fáa kristin fólk kring allan heimin at biðja fyri Ísrael, og at kunna um landið og fara undir verkætlanir her. Arbeitt verður eisini við at skapa forsóning millum arabarar og jødar.

**sb.**

## Evnisdagur um kristna felagsskapin

Leygardagin 17. mars skipa felagið »Agape« og Kirkjuliga Heimamissiónin fyri evnisdegi í Missiónshúsinum í Hvalvík við evninum "Kristni felagsskapurin".

Umrødd verða m.a. hvat ein meinigheit er, hvørjir dynamikkir eru til staðar, hvat byggir upp og hvat brýtur niður, og hvussu ein kann fáa øll at virka sum eitt toymi og hvussu ein loysir ósemjur.

Undirvísari verður Steen Palmqvist, psyko- og familjuterapeutur

Dagurin byrjar við morgundrekka kl. 9.30 og heldur fram til kl. 17.00. Kostnaðurin er 200 krónur, og tá er døgurði íroknaður. **sb.**

# ABC fer undir fyrstu verkætlanina

**ABC barnahjálp er í løtuni í ferð við at skipa arbeiðið sítt í Føroyum.**

**Hesin hjálparfelagsskapurin vil stuðla børnum í tilafturskomnum londum. Fyrsta verkætlanin verður í afrikanska landinum Liberia**

BARNAHJÁLP
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Hóast felagið enn ikki er farið av álvara til verka, hevur nevndin í felagnum kortini sett sær nøkur mál fyri.

Gjøgnum felagið verður møguligt at stuðla einum ella fleiri børnum við persónligum gjaldi til skúlagongd og lækna.

- Hesin stuðulin fer óskerdur til tað einstaka barnið. Eisini kunnu einstaklingar, virkir og fyritøkur tekna fast gjald til raksturin, sigur Rúna Sivertsen, forkvinna í føroysku deildini.

Hóast hetta er longu klárt at fara undir fyrstu verkætlanina í Liberia. 19 mars fær felagið haraftrat vitjan úr hesum landinum.

### Forvitnislig vitjan

19. mars fær ABC barnahjálp nevniliga vitjan av Matthew Sakeuh úr Liberia, sum felagið kemur at samstarva við í sambandi við arbeiðið í landinum.

Matthew steðgar her nakrar dagar og er ætlanin at skipa fyri fundum, har hann fer at greiða frá arbeiðinum og viðurskiftunum í heimlandinum.

Men tað er kortini ikki bert í útlondum at ABC ætlar at arbeiða. Við slagorði sínum "Gud er faðir teirra móður- og faðirleysu – og vit mugu sýna tað í verki" fer felagið eisini at arbeiða her á landi.

Fyrsta serstaka føroyska verkætlanin verður "Børn hjálpa børnum". Hetta er eitt árligt afturvendandi tiltak, sum tey hava góðar royndir av í Íslandi.

Her er arbeiðið skipað á tann hátt, at næmingar í fólkaskúlanum hjálpa til við innsavning av peningi til keyp av grundøki og bygging av skúlum og barnaheimum.

– Vit miða eftir at hava fyrstu innsavningina longu í hesum skúlaárinum, sigur Rúna Sivertsen.

Enn vantar at fáa tey seinastu formligu viðurskiftini í rættlag, áðrenn arbeiðið veruliga kann fara í gongd. Hinvegin ber longu til at stuðla rakstrinum av ABC barnahjálp, sum hevur konto í øllum peningastovnunum

### 6000 børn

Virksemið hjá ABC barnahjálp byrjaði í 1988 og hevur sín hevur uppruna í Íslandi. Higartil hevur felagsskapurin bert virkað har á landi.

Umframt at stuðla børnum við persónligum gjaldi til skúlagongd og lækna, byggir ABC barnahjálp eisini skúlar og skúlaheim.

Higartil hevur felagsskapurin bygt skúlar og heim í India, Uganda, Filipsoyggjunum, Pakistan og Kenya.

Í løtuni verða meira enn 6000 børn undirvíst í skúlunum í skipanini hjá ABC barnahjálp í Íslandi.

Nú hava føroyingar eisini fingið møguleika at stuðla slíkum verkætlanum.



*Nevndin í ABC Barnahjálp: Karsten Hansen peningarøkil Hilda Viderø, Margreth Olsen skrivari, Rúna Sivertsen forkvinna, Beinta Háberg Jacobsen, Maibritt Fredriksberg og Rúni Hentze næstformaður*

*Mynd:Sámal Samuelsen*



*Arbeiðið hjá ABC vendir sær millum annað til faðirloysingar og móðurloysingar í afrikanska landinum Liberia*

# Kvinnur kring allan heimin í bøn

**Fyrsta fríggjadag í mars mánaði verður altjóða kvinnubønardagurin hildin.**

**Soleiðis hevur verið í samfull 120 ár, og árið 2007 er einki undantak í so máta.**

BØNARDAGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hvørt ár verður eitt ávíst land útvalt til at verða biðið fyri. Í ár er suðuramerikanska landið Paraguay evnið.

Ein bólkur av kvinnum frá ymsum kristnum samkomum í Paraguay hava í eina tíð arbeitt við at gera skránna til Altjóða kvinnubønardagin í ár.

Í hesi skránni lýsa tær suðuramerikansku kvinnurnar tørvin og neyðina í landinum, og verður henda skráin síðani send til kvinnur í 180 londum. Hvørt land umsetir so skránna til teirra mál, og tað sigst, at hesa ferð verður skráin umsett til fleiri enn 1000 mál.

Her hjá okkum verður altjóða kvinnubønardagurin hildin nú fríggjadagin á trimum støðum: Í KFUM í Havn, í kirkjukjallaranum í Christianskirkjuni í Klaksvík og í missiónshúsinum í Vági. Í øllum støðum verður byrjað kl. 19:30.

Eingin veit við vissu, nær fyrsti Altjóða kvinnubønardagurin var í Føroyum, men í 1964 varð lýst í bløðunum, at dagurin var í KFUK.

Í dag eru kvinnur úr sjey samkomum í Føroyum við til at skipa fyri Altjóða kvinnubønardegnum.

Vegna tíðarmunin í heiminum biðja ikki allar kvinnurnar um somu tíð. Dagurin byrjar við sólarrisi á Tongaoyggjunum í Kyrrahavinum og heldur fram runt heimin til seinasta møtið á Samoa-oynni í Kyrrahavinum.

### Deila ótta og gleði

Gjøgnum Altjóða kvinnubønardagin eru kvinnur um allan heimin við til í fyrstu syftu, at játta sína trúgv á Jesus Kristus og at deila vón og ótta, gleði og sorg, møguleikar og tørvir hjá hvørji aðrari.

Gjøgnum Altjóða kvinnubønardagin verða kvinnurnar samstundis eggjaðar til at liva ikki bert í sínum nærumhvørvi, men at fylgja við runt í heiminum, og at ríka seg av royndunum hjá trúgvandi í øðrum londum og við aðrari mentan.

Tær ynskja eisini, at deila byrðarnar hjá øðrum og at biðja við og fyri teimum og síggja møguleikarnar at tæna í samfelagnum.

Kvinnurnar vátta somuleiðis, at bøn og handling hoyra saman og eru av sera stórum týdningi fyri heimin, út frá tí sum Jesus sjálvur bað: "At tey øll skulu verða eitt".

Júst hetta kann hesin felagsskapur vera tekin um.

### Stuðla peningaliga

Peningainnsavnan er hvørt ár, tá altjóða kvinnubønardagurin verður hildin.

Í ár verður peningurin latin til tríggjar ymiskar verkætlanir:

Eina bønardagsvekrætlan fyri Brasilia: Innbúgv til eitt mammuheim í Brasilia

Dansk Missionsforbunds Kvinder: Stuðul til barnaheim í Ghana og Verkstað til ung í Illulissat í Grønlandi

Stuðul til okkara biðidagssamskiparar í Litava, Ukraina og Malawi.